# Jólatilboð frá Sprotanum



## Klaksvíkar søga

Klaksvík var upprunaliga navnið á eini lítlari óbygdari vík vestarumegin vágna, men tá ið Kongaligi Einahandilin í 1838 setti úthandil á stovn við hesa víkina, fekk hon so stóran týdning fyri allar Norðuroyggjar, at navnið á víkini vann hevd sum felagsnavn fyri allar býlingarnar.

Beinleiðis frá forlagnum kr 250,-




## Heini Olsen: Meg minnist

Heini Olsen hevur strokið víða í sínum lívi og hevur stóran part av ævini virkað millum fólk, sum eru okkum ógvuliga fremmand. Hann hevur sæð og hoyrt mangt forvitnisligt og skemtiligt, sum hann nú er farin undir at geva út í einum bókaraði. Í hesari bókini byrjar hann við barna- og ungdómsárunum.

Beinleiðis frá forlagnum kr 300,-



## Gunnar Hoydal: Í havsins hjarta

Í havsins hjarta er skaldsøga um tíðina frá jólafundinum gjøgnum tjóðskaparrørslu, heimsbardaga, fólkaatkvøðu, kalda kríggið og stóra skædlið fram til fólkafundin á Slættaratindi. Ein søga um vónir og vónbrot í hundrað ár.

Tilboð kr 198,-



## Carl Jóhan jensen: Ó-søgur

Ó- tað ódeyða, tað útroknil̈ga er holdbundið í Bænadikti Chonradsen, keypmanni. Eingin veit, hvaðani hann er upprunnin, ella hvør hann er. Men djevulskapurin breiðir seg frá honum gjøgnum farna og farandi tíð, døkkur og tilvildarligur sum ein deyðilig smitta, sum ein pest.

Tilboð kr 198,-



## Halldór Laxness: Undir egið borð

Undir egið borð er ein av best umtóktu skaldsøgunum hjá Halldóri Laxness. Hon er kanska ein tann størsta skaldsøgan, ið nakrantíð er komin út í Norðurlondum

Tilboð kr 198,-



## Martin Joensen: Lat meg goyma teg

"Lat meg goyma teg" er eitt úrval av teimum bestu yrkingunum hjá Martini. Pauli Hansen hevur skrivað nótar til øll løgini og í einum lumma á bakinum er savnsfløga við teimum bestu sangunum hjá Martini Joensen.

Bókin er 200 síður og gjøgnumlitað við teimum bestu skitsunum og málningunum eftir Martin Joensen.

kr 148,-




## Snorra Edda (Poul Vestergaard týddi)

Í SNORRA EDDU ber til at lesa um, hvussu gomlu norðbúgvarnir hugsaðu sær, at heimurin varð skaptur burtur úr holdi og blóði á eini livandi veru, og hvussu heimurin fer at ganga undir, tá ið allar óndar kreftir savna seg at drepa, brenna og týna alt.

kr 125,-




## Vølsungasøga (Poul Vestergaard týddi)

VØLSUNGASØGA er grundarlag og íblástur til Nibelungen Ring hjá Wagner og til Ringanna Harra hjá Tolkien.

Hon greiðir frá allari ættini hjá Sjúrði Fávnisbana, hvør faðirin og fedrarnir vóru, hvaðan svørðið kom, hví tað brotnaði, hví Favnir legðist á gullið, hvaðan gullið kom, og hvar tað endaði.

kr 125,-




## Oddfríður M. Rasmussen – Lívrám

Við hesum nýggja yrkingasavninum gongur Oddfríður nýggjar leiðir...

Beinleiðis frá forlagnum kr 98,-




## KATEKISMUS

– Marjun Bæk føroyskaði og legði til rættis - vendir sær til øll, sum kristindómurin so ella so ger spurin ella forvitin.

Umframt tekstin eru verk hjá nútímans listafólkum karmur um hvønn partin í bókini. Aftur við listaverkunum eru stuttir tulkandi tekstir og eitt sitat úr bíbliuni, sum knýtir tey saman við tekstirnar.

Tilboð kr 148,-



## Bárður Jákupsson: Visual Art in the Faroes

Skalt tú senda jólapakkar til útlond, so er Visual Art in the Faroes ein ideel gáva. Hetta er enska útgávan av »Myndlist í Føroyum«. Bárður Jákupsspn ger ferð gjøgnum føroysku listasøguna frá byrjan til uml. ár 2000

Tilboð kr 98,-



## Carl Jóhan jensen: Apuvit og heimastýri

Ritið avdúkar skaldsins innastu kenslur fyri heimastýri og øðrum hálvhjartaðum loysnum.

Til ber til eitt vist at liva í einum heimi við ongum støðutakanum, men tað ger, at fólk fløkja seg inn í eitt eiturfon av undanførslum.

Tilboð kr 98,-

Bílegg á sprotin@sprotin.fo ella tlf. 214248

SPROTIN